# Milan skal venja B36

B36 hevur gjørt avtalu við Milan Cimburovic, sum við hesum verður nýggjur høvuðsvenjari fyri ungdómsdeildirnar hjá B36. Milan, sum er serbi, hevur verið í Føroyum seinastu 10 árini, og hevur hann spælt og verið venjari hjá NSÍ, Royn, TB og VB/Sumba. Seinastu árini hevur hann verið ungdómsvenjari í TB.



# Nigeriani venur í B36

Tá B36 um vikuskiftið spældi venjingardyst móti Skála, var nýggjur maður við í hópinum. Hesin eitur Emmanuel Kuma, og er talan um álopsspælara úr Nigeria. Undan vitjanini her í Føroyum hevur hann í trý ár spælt við Dynamo Dresden, sum spælir í týsku regionla-liguni. Skála vann annars venjingardystin millum liðini 2-1.

# Tvey silvur í NM-talvi

**Helgi Dam Ziska og Høgni Egilstoft Nielsen vunnu báðir silvurmerki, tá NM í talvi fyri ungdómar varð hildi í Tjele á Jútlandi**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kappingin er skipað í 5 aldursbólkum. Telvað vórðu 6 umfør.

Føroyar vann silvur í U20 bólkinum, har Helgi Dam Ziska, úr Tórshavn, endaði ájavnur Gudmundi Kjartanssyni úr Íslandi við 4½ stigi. Tíverri vóru mótstøðustigini hjá Helga eitt vet verri enn hjá Kjartani og tískil gjørdist talan um 2. pláss og silvur. Enn ein sera góð kapping hjá 17 ára gamla IM Helga Dam Ziska, sum 3. árið uppí slag vinnur heiðursmerki við NM: 2006 (gull), 2007 (bronsa) og í 2008 (silvur).

Eisini í yngsta U10 bólkinum bragdaði av álvara, tá 10 ára gamli Høgni Egilstoft Nielsen, úr Sandavági, vann silvur við 5 stigum av 6 møguligum. Egor Norlin úr Svøríki vann gull ½ stig fremri. Ein sera góð kapping hjá Høgna og tað er sera sjáldan, at NM-gull ikki spyrst burturúr, tá telvari megnar at fáa 5 stig í kappingini. Hetta er føroyskt met.

Samstundis skrivaðu Helgi og Høgni søgu, tí tað hevur ikki eydnast Føroyum áður at vinna silvurheiðursmerki. At vinna 2 í somu kapping er einastandandi væl klárað og ber boð um, at vit eru á rættari leið - ikki minst tá samanborið verður við avmarkaða tilfeingi okkara í mun til hini norðurlondini. T.d. vann Danmark onki heiðursmerki hesuferð.



*10 ára gamli Høgni Egilstoft Nielsen vann eins og Helgi Dam Ziska silvur, nú NM-kappingin í talvi fyri ung var á skránni*
*Mynd: Talvsamband Føroya*

## FAKTA

**Føroysku úrslitini**

| Bólkur | Telvari | Stig |
|---|---|---|
| U20 | IM Helgi Dam Ziska | 4,5 |
| U20 | Rógvi Dragaberg | 1,5 |
| U16 | Rógvi Egilstoft Nielsen | 2,5 |
| U16 | Hjalti Toftum Jógvansson | 2,0 |
| U14 | Rúni Vørmadal | 0,5 |
| U14 | Pætur Poulsen | 0,5 |
| U12 | Einar Gregersen | 1,5 |
| U12 | Heðin Gregersen | 2,5 |
| U10 | Høgni Egilstoft Nielsen | 5,0 |
| U10 | Sjúrður Olsen | 1,5 |

# Báðir finalistarnir settu met

**Um vikuskiftið skipaði Bogaskjótifelagið Tambar fyri kappingum í Havn. Leygardagin skutu børnini 15 metrar og sunnudagin skutu tey vaksnu 18 metrar**

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*

Tað eru ov fá ung, sum skjóta við compound, men enn einaferð vísti Magnus Andreassen úr Ørvi (Ø), at hansara skjóting í ár er betri enn nakrantíð. Hann gjørdi bart og setti nýtt føroyskt met við at skjóta (286+289) 575 stig. Gamla metið átti Kristoffer Andreasen við 573 stigum.

Í bólkinum recurve vóru heldur fleiri luttakarar – 12 í tali. Sum heild kann sigast, at innleiðandi umfarið gekk sera væl. 9 skjúttar skutu persónlig met.

Bestu innleiðandi úrslitini vóru: Bogi Andreasen, VágaSkot (V), (261+270) 531 stig og persónligt met, nr. 2 Rógvi Larsen Tambar (T), (248-261) 509 stig og persónligt met, nr. 3 Rani Beder (T) (248+251) 499 stig og persónligt met og nr. 4 Rógvi Dalsgarð (T) (230+245) 475 stig.

¼-finalurnar: Bogi A-Odd Andreasen (Ø) 110-87, Rani-Oddmar Nielsen (Ø) 102-87, Sirið Rein (T)-Rógvi D 97-96 og Rógvi L.-Ørvur Guttesen (Ø) 93-62.

½-finalurnar: Bogi A.-Sirið 111-96 og Rani-Rógvi L. 103-100.

Dysturin um triðja plássið var millum Sirið og Rógva L og endaði dysturin 102-93.

Dysturin um fyrsta plássið var millum Boga A. og Rana. Hesin dystur var sera javnur við umfarsúrslitunum 27-27, 27-28, 28-24 og 26-26. Sostatt vann Bogi 108-105.

### Vaksin

Í compound bólkinum vóru innleiðandi úrslitini hesi: Jógvan Niclasen, (T), (284+284) 568 stig, nr. 2 Per Holm Andersen, (Ø) (280+283) 563 stig, nr. 3 Nikkel Petersen (Ø) (272+274) 546 stig og persónligt met, og nr. 4 Kaj Johannesen (Ø) (269+271) 540 stig og persónlig met.

¼-finala: Magnus og Kaj skutu ein javnan dyst 106-106 og máttu sostatt hava umskjóting, sum Magnus vann 10-9.

½-finalurnar: Jógvan Niclasen-Magnus 114-101 og Per-Nikkel 114-106.

Dysturin um triðja plássið var millum Magnus og Nikkel og var javnur við úrslitinum 107-105.

Finalan var millum Jógvan og Per. Hendan dagin vístu teir báðir sera góða skjóting í dystunum. Í finaluni skutu teir báðir omanfyri gamla føroyska metið, sum var 117 stig. Úrslitini í umførunum vóru 29-30, 30-29, 30-29 og 30-30, og endaði dysturin við sigri til Jógvan við 119-118. Jógvan setti nýtt føroysk met. Sigast kann, at mann í mesta lagi kann skjóta 120 stig í einum dysti, sum hesum.

Í bólkinum recurve vóru 6 luttakarar. Innleiðandi úrslitini vóru hesi: Eirikur í Jákupsstovu (Ø) (271+250) 521 stig, nr. 2 Jógvan Magnus "Eggaba" Andreasen (V) (254+253) 507 stig, nr. 3 Tórfinn Hansen (V) (250+247) 497 stig og persónligt met, og nr. 4 Jastrid M. Jensen (T) (248+229) 477 stig.

¼-finalur: Tórfinn-Rakul Dam (T) 97-94 og Jim S. Guttesen (V)-Jastrid 102-97.

½-finalur: Tórfinn-Eggaba høvdu ein javnan dyst, sum endaði 104-103. Eirikur-Jim 98-86.

Dysturin um triðja plássið var millum Jim og Eggaba og endaði hann 99-90.

Dysturin um fyrsta plássið var millum Tórfinn og Eirik og vóru hesi úrslitini í umførunum 29-26, 26-26, 27-26 og 25-25 og endaði tað sostatt við sigri til Tórfinn 107-103.

